# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Steinvending

Nú skal hvør steinur vendast á teimum trimum sjúkrahúsunum, og steinvendarin er danska ráðgevarafyritøkan Valcon. Soleiðis ljóðar úr landsstýrinum. Tað er ikki óvanligt, tá stjórn stendur við stórum trupulleika av stovni ella øki, at ein letur ráðgevarafyritøku kanna trupulleikarnar. Tá ein so vil leggja serstakliga stóran dent á kanningina verða nýttar fríðkandi máliskur sum hvør steinur skal vendast . Tað kemur sjáldan nakað nýtt og gott burtur úr slíkum kanningum, og kanning og kanningartilgongd eru oftast órógvandi fyri viðkomandi stovnar. Slíkar kanningar avdúka sjáldan nakað, ið avvarandi myndugleikar ikki vistu frammanundan. Men slíkar kanningar eru góðir snarljósleiðarar og henda "steinvendingin" er helst prísurin fyri at komast kann burtur úr aktuellu politisku kreppuni og fíggjar- og stovnskreppuni í sjúkrahúsverkinum.

Starvsfólkið á sjúkrahúsunum skal sostatt fyrireika seg til enn eina tíð við ótryggleika og órógv. Vit skulu ikki avvísa, at henda kanning fer at gagna sjúkrahúsverkinum. Tað velst í fyrstu atløgu um, hvat kanningarúrslitini koma at vísa. Í øðrum lagi velst um, hvørjar politiskar niðurstøður landsstýrið samlað kemur til við atliti at kanningini. Í triðja lagi velst um politiska viljan og dirvið at seta í verk tey tilmæli, sum Valcon ivaleyst fer at koma við. Hugsa vit okkum, at Valcon kemur við tilmælum, sum politiskt fella samgonguni væl og semja er um tey, ja, so er lag á manni at leggja til brots og seta tilmælini í verk. Men hugsa vit okkum hin møguleikan, at tilmælini, ella týðandi partar av tilmælunum, ikki politiskt kunnu góðtakast av pørtum av samgonguni, er líka vítt sum sítt. So hendir als einki - ótryggleikin og órógvin halda fram til ógagns fyri alt sjúkrahúsverkið, les tó serstakliga Landssjúkrahúsið.

Tað er sostatt ikki ein vandaleys tilgongd, sum samgongan hevur sett í verk, og stígast má sera varliga, um ikki steinvendingin skal gera meira skaða enn gagn. Hinvegin fara vit hvørki at kolldøma avgerðina um kanning ella kanningina sjálva – hon má nú standa sína roynd og so mugu politikararnir standa teirra roynd, tá úrslit og tilmæli eru komin á borðið. Vit vísa bert á vandar og ivamál og mæla til varsemi, so steinvendingin ikki endar í eini botnvending í sjúkrahúsverkinum. Uttan mun til, hvør endin á hesum máli verður, so broytir ein kanning sum hendan neyvan grundleggjandi trupulleikan, at vit ongan yvirskipaðan heilsupolitikk hava – at ikki verður ásannað, at kreppan grundleggjandi er, bygnaðarlig, strukturel! Hendan trupulleikan skal Valcon eftir arbeiðssetninginum at døma ikki viðgera. Tað er tí lítið útlit til, at kanningin fer at elva til ein heilsupolitikk, har grundleggjandi trupulleikar, eitt nú ein avoldaður sjúkrahúsbygnaður, verða loystir, so er hóast alt okkurt gott komið burturúr.

**Sosialurin**

# Atlantsflog linnar um fíggjarligar timburmenn hjá leiðslu felagsins

**ARNI VATNHAMAR**
Váðaráðgevi og Cand.jur, HD(R)

Tann 20. juni í ár seldi leiðslan í Atlantsflog helmingin av partabrøvum sínum í felagnum til Atlantsflog. Hetta hendi eftir, at tað við viðtøkubroytingum í apríl mánað var vorðið møguligt. Atlantsflog keypti hesi partabrøv frá leiðsluni fyri 10 % yvir marknaðarkursin. Nakrar dagar seinni segði landsstýriskvinnan í Vinnumálum í fjølmiðlunum, at hon onki kendi til hesa sølu fyrr enn hon longu var farin fram. Undirritaði kundi ikki lata verða við at gera eina viðmerking til hesa sølu, og setti stórt spurnarteking við ta signal, sum leiðslan og nevndin í Atlantsflog sendu við hesi framferð.

Týsdagin 8. juli legði landstýriskvinnan lok á hetta mál og valdi at friða nevnd og leiðslu felagsins fyri hesa framferð. Hetta er eftir mínum tykki sera óheppið, og kann ikki standa uttan enn eina viðmerking.

Ikki vænti eg, at nógv verður broytt við hesa avgerð, líka sum hendingin longu nú so smátt kann sigast at verða farin fram við borðinum. Spyrji eg t.d. fólk, sum eg kenni um hetta mál, yppa tey øksl og spyrja smílandi, um eg hevði væntað annað? Eg loyvi mær tó hesa viðmerking, tí hetta mál er eitt klokkulárt skúla-dømi um hvussu IKKI má farast fram, um nevnd og leiðsla ynskja bestu kor fyri felagsins skrásettu partabrøv.

Landsstýriskvinnan boðaði í Degi og Viku frá, at hon, eftir at málið nú er kannað út í æsir, og hóast staðfestast kundi, at handilin var óheppin, so vil framferðin ikki fáa avleiðingar fyri hvørki nevnd ella leiðslu felagsins.

Grundgevingin hjá landsstýriskvinnuni fyri hesi avgerð er: "At nevndin var í eini støðu, sum gjørdi, at hon metti, at hetta var tað besta at gera undir teimum givnu umstøðunum fyri at hjálpa felagnum fyri at tryggja best møguligt virðini hjá felagnum".

Hóast grundgevingin hjá landsstýriskvinnuni ikki er serliga greinandi, men heldur óklár, so tulki eg landsstýriskvinnuna soleiðis, at framferðin hjá nevndini fær ongar avleiðingar av teirri orsøk, at virðið felagsins var best tryggja, við at nevndin keypti helmingin av partabrøvunum hjá leiðsluni fyri yvirkurs, soleiðis at leiðslan slapp undan fíggjarligum timburmonnum í samband við íløguna í Atlantsflog fyri læntan pening.

Hvussu hetta hongur saman havi eg torført við at skilja. Tá hugsað verður um tær avbjóðingar, sum Atlantsflog hevur fyri framman við hækkandi orkuprísum og øktum atfinningum ímóti flogførum av slagnum BAe 146, áttið tað at hava staðið nevndini og leiðsluni í Atlantsflog klárt, at søla av einum so stórum parti av partabrøvum leiðslunar, vildi føra slíkan óróð við sær millum íleggjarar, at sannlíkindini fyri einum kursfalli vildu vorðið munandi økt. Hetta óansæð, um sølan fór fram á virðisbrævamarknaðinum ella við eini avtalu við ein íleggjara uttan um virðisbrævamarknaðin. Men hví nevndin helt, at virðið felagsins best vórðu tryggja við at lata Atlantsflog gjalda yvirkurs fyri eitt frammanundan væntað kursfall, havi eg sera torført við at skilja.

Hvat landsstýriskvinnan tískil meinar er alt annað enn klárt, og landsstýriskvinnan kundi kanska kasta ljós yvir hetta við at almannakunngera úrslitini frá kanningini, sum umsiting hennara hevur gjørt í samband við málið. Hetta kundi kanska eisini verið við til at endurreisa nakað av tí álitinum, sum marknaðurin hevur mist til Atlantsflog partabrævið.

Samstundis metir landsstýriskvinnan, at hon má vera meira enn vanliga varin við at blanda seg politiskt í eitt skrásett partafelag, fyri ikki at gera nakað, sum ger støðuna enn verri í mun til, hvussu marknaðurin longu hevur reagerað uppá framferð nevnd og leiðslu felagsins.

Hvat liggur aftan fyri hesa metan skal eg lata verða við at gita um (hetta framgongur kanska av kanningini hjá landsstýriskvinnuni), men spurningurin er, um ikki marknaðurin hevði tikið jaliga ímóti eini meira hondfastari innblanding frá partaeigaranum við fullum kontrol yvir felagnum. Sum viðurskiftini eru eftir avgerðina, so hevur landsstýriskvinnan við hesi blanku frífinning av nevndini og leiðsluni í Atlantsflog blástemplað, at persónlig fíggjarlig viðurskifti hjá leiðslu felagsins verða blandað saman við fíggjarligu viðurskiftini í felagnum (leiðslan fekk enntá eitt herðaklapp fyri at gera slíkt við, at felagið gav 10 % yvirprís fyri partabrøvini).

Hetta skapar ikki tryggleika fyri núverandi og møguligar íleggjarar, og kann tískil ikki sigast at styrkja um virðið felagsins!

Tað eru fleiri og góðar orsøkir til, at eitt felag ynskir at eiga egin partabrøv. Ein av hesum er, at felagið hervið lættir um møguleikan at gera bonusskipanir fyri leiðslu felagsins, fyri soleiðis at tryggja, at leiðslan ger sítt ítasta fyri at økja um kursvirðið í felagnum. Ikki er óvanligt, at ein leiðsla fær bjóðað at keypa av partabrøvum felagsins til ein frammanundan avtalaðan kurs. Um leiðslan ger eitt gott avrik, soleiðis at marknaðarkursurin hækkar upp um tann avtalaða kursin, kann leiðslan lønast fyri góða avrikið við muninum millum marknaðarkursin og avtalaða kursin.

Áhugavert verður nú at síggja, hvat nevndin í Atlantsflog fer at brúka tey júst keyptu partabrøvini til. Serliga áhugavert verður at síggja, um leiðslan verður boðin tílíkar bonusskipanir, og soleiðis fær bonus tvær ferðir fyri somu partabrøv, ella um nevndin ætlar at halda fast í partabrøvunum inntil kursurin hækkar so mikið, at partabrøvini aftur kunnu seljast við yvirskoti. Tá hugsað verður um framtíðarútlitini hjá flogferðsluni sum heild, er ivasamt um nevndin við sølu av partabrøvunum kann heinta tað mista kursvirðið uppá 29 %, sum í minsta lagi (fíggjarkostnaðirnir ikki íroknaðir) krevst fyri, at handilin vil geva yvirskot fyri Atlantsflog í bræði.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støddir:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.